# Listin ikki góð kor í skúlanum

**– Fólkaskúlin hevur alt ov lítið at bjóða næmingum av kreativum lærugreinum og raðfestir sum heild list alt ov lágt, sigur Arngerð Joensen, sum í næstum hevur skeið í tekning og máling fyri størri børn**

LISTASKÚLI
*Turið Kjølbro*



*– Nógv skúlabørn sakna veruliga at sleppa at verða meiri kreativ, eins og eg gjørdi í síni tíð í fólkaskúlanum, sigur Arngerð Joensen, sum er útbúgvin fólkaskúlalærari, men sum burturav arbeiðir við list.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hevur tú serligan áhuga og hegni til list, hevur føroyski fólkaskúlin ikki nógv at bjóða tær. Tað heldur Arngerð Joensen, sum hevur listaskúla í Hoyvík. Av sínum eintingum hevur hon skipað fyri skeiði í tekning, máling og leirgerð fyri børnum og øðrum málbólkum. Í komandi mánaði verða tvey skeið á skránni. Eitt fyri børn í aldursbólkinum 10-14 ár, har til ber at læra meiri um tekning, máling og leirgerð. Hitt skeiðið er ætlað ungum, sum hava eitthvørt brek.

– Fólkaskúlin hevur alt ov lítið at bjóða næmingum av kreativum lærugreinum og raðfestir sum heild list alt ov lágt. Lítið og einki tilfar er til taks og hølini, sum eru, eru als ikki egnað at hava undirvísing í umframt at tey eru alt ov fá í tali. Tað vísir seg ógvuliga ofta, at børn, sum altíð hava dámað væl at tekna og mála, stegða við hesum tá ið tey gerast umleið 12 ár, millum annað tí at onnur áhugamál og aðrar lærugreinir troðka seg framat.

Tað er rættiliga harmiligt, tí júst tá eru tey í stórari menning til at kunna halda fram við listini. Nógv skúlabørn sakna veruliga at sleppa at verða meiri kreativ, eins og eg gjørdi í síni tíð í fólkaskúlanum. Hetta er veruliga spell, sigur Arngerð Joensen, sum er útbúgvin fólkaskúlalærari umframt at hon hevur tikið ørgrynnu av skeiðum um ymiskt innan list.

Tey, ið tekna seg til skeiðið í Hoyvíkar Listaskúla, kunnu vænta sær ein breiða og neyva undirvísing í tekning, máling og leirgerð.

– Eg gevi teimum formfatan, læri tey at leggja ljós og skugga, tekna menniska, og ymiskt annað. Tey, ið heldur vilja mála, læri eg at blanda litir saman, komposisjón, ljós og skugga, perspektiv og ymsar málitekníkkir. Onnur vilja heldur arbeiða við leir og har eru nógvir mátar at arbeiða uppá, sigur Arngerð.

Arngerð tekur støði í hvørjum barni sær soleiðs at ein og hvør fær júst ta undirvísing, ein hevur tørv á og áhuga fyri. Skeiðini, sum verða á Eysturskúlanum, verða í tvær vikur í september eftir skúlatíð.

Hoyvíkar Listaskúli hevur fingið stuðul frá Mentamálastýrinum til skeiðini, sum eru á skránni í september. Stendur tað til Arngerð Joensen skipar skúlin fyri skeiðum av og á. Nøkur pláss eru eftir til skeiðið, sum verður í døgunum 3. sept. til 15. sept. Hitt skeiðið er fullteknað.

# Sleppa ikki at hava svín í Mykinesi

**Tveir mykinesmenn høvdu ítøkiligar ætlanir um at fara undir svínahald í Mykinesi. Men tað bar ikki til, uttan við almennum studningi og tað vil landsstýrið ikki**

ÚTOYGGJAR
*Áki Bertholdsen*



*Stóð tað til mykinesmenn, høvdu føroyingar aftur farið undir svínahald. Men Landsstýrið letur ikki kjøtstuðul til svínakjøt á sama hátt sum stuðul verður latin til neytakjøt og tí er ætlanin dotin niðurfyri*

Tað er nú greitt, at ætlaninar hjá tveimum mykinesmonnum at fara undir svínahald í Føryum aftur, verða av ongum.

Svínahald hevur ikki verið í Føroyum síðani svínagarðurin í Froðba helt uppat fyri nøkrum ársum síðani, men nú ætlaðu tveir mykinesmenn at taka táttin uppaftur.

Tað var Esberni Eyðansstovu, sum sjálvur annar hevði lagt ítøkiligar ætlanir um at fáa sær svínagarð í Mykinesi.

Tað er nakað síðani, at teir søktu vinnumálastýrið um loyvi at fara undir ætlanina.

Við hjálp frá royndarmiðstøðini sendu teir stýrinum umsókn um at sleppa undir ætlanina, saman við eini rakstrar- og kostnaðarætlan.

Ætlanin hjá teimum er nevnd í útoyggjaálitinum, sum kom fyrr í ár og vit hava ringt til teirra at fregnast, hvat varð av henni.

Esbern í Eyðansstovu sigur, at tað hevur alla tíðina verið greitt, at hetta er ikki ein ætlan, sum letur seg gera, uttan almennan studning.

Og nú tað er greitt, at hetta verður av ongum, vat tað júst spurningurin um almennan studning, sum punkteraði ætlanina.

Esbern í Eyðansstovu sigur, at teir hava fingið svar frá Vinnumálastýrinum, har boðað verður frá, at almennur stuðul verður ikki latin til ætlanina.

– Sostatt mugu vit ásanna, at ætlanin verður ikki burðardygg og tískil hava vit slept henni. Tá ið vit ikki fáa stuðulin, er onki at gera, sigur Esbern í Eyðansstovu.

## 500 svín

Hann sigur, at ætlanin hjá teimum var at gera ein garð í Mykinesi, har teir kundu dripið 500 svín svín um árið, ella gott tað.

Hann sigur, at tá ið tey verða dripin, høvdu kropparnir vigað um 75 kilo hvørt.

Tilsamans hevði ætlaði svínagarðurin í Mykinesi sostatt givið 37,5 tons av svínakjøti um árið.

Tað halda mykinesmenninir hevði verið eitt gott íkast til føroyska marknaðin, tí tað verður mangt slíkt flutt inn av svínakjøti um árið.

Tað, sum teir høvdu søkt landsstýrið um at fáa í stuðuli, vóru átta krónur í kjøtstuðuli fyri kilo.

Ætlanin hevði sostatt kostað landsstýrinum 300.000 krónur um árið. Men teir ivast í, um tað hevði verið nøkur útreiðsla, tá ið alt verður talt saman, og sett upp ímóti teimum skattað og avgjaldskrónum, sum hetta hevði kastað av sær til land og kommunu og so tað, sum hevði verið spart í innflutningi.

Men fyri eitt pláss sum Mykines hevði tað har sera stóran týdning at fingið nøkur arbeiðspláss til bygdina.

Teir vísa eisini á, at teir, sum drepa neyt, fáa kjøtstuðul, einar 9-10 krónur fyri kilo. Men at fáa sama stuðul til svínakjøt letur seg altso ikki gera.

# ítróttur

Nr. 2 • hósdagur • 4. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Stóri møguleikin hjá FCK



*Christian Lønstrup er í løtí skaddur, men annars tykist FCK at vera so væl fyri, sum til ber, áðrenn farið verður til Lazio. Her sæst hann vitja á sonvendu familjutribununi, tá FCK fríggjadagin taptu fyri AB*
*Mynd: Jonhard Hammer*

**Todi Jónsson hevur týskvøldið møguleika at gera fyrsti føroyingurin, sum vinnur sær rætt at luttaka í UEAF-Champions League**

EUROPA-CUP
*Jákup Mørk*

Tær 200.000 krónurnar, sum spælararnir hjá FCK fáa útgoldið, um teir standa royndina týskvøldið, eru smápengar aftur ímóti tí, sum felagið kann vinna, um teir vinna seg fram til fyrra bólkaspælið fyri meistarar.

## Pengamaskina

Sonevnda Champions-League, sum við tíðini er komin at umfata nógv meira enn bara meistaraliðini, hevur nú í eitt tíggjuára skeið ment seg til at gerast ein sonn pengamaskina hjá stóru europeisku feløgunum.

Tað er eisini eftir ynski frá hesum, at UEFA hevur latið seg trýst til verandi kappingarformin, og tíverri má sigast, at hetta er hent upp á kostna av teimum smærru feløgunum.

Í europeiskum høpi verður FCK eisini framvegis rokna millum hesi smærru feløgini, men um Flemming Østergaard og hansara menn fáa sín vilja, so verða hvítu leyvurnar ikki verandi ímillum tey smáu.

## Gott útgangsstøði

Pengar skulu tó til, og tí er tað týdningarmikið hjá FCK at koma til bólkaspælið, tó at uppgávan valla kundi verið størri enn hon er týskvøldið.

Lazio hevur bert eina ferð vunnið eina kapping í europeiskum høpi, men seinnu árini hevur felagið veruliga ment seg til eitt av teimum stóru í Italia, og harvið eisini í Europa. Hetta sæst eisini aftur í stjørnusetta leikarahópinum. Har eru fleiri leikarar, sum hvør sær verða virðissettir væl hægri á fótbóltsmarknaðinum enn samlaði hópurin hjá FCK, men tíbetur er tað soleiðis í fótbólti, at ein rúgva av pengum ikki merkja tað sama sum gull og heiður.

FCK hevur nevnliga eitt hampuliga gott útgangsstøði, tá teir fara á Olympiska leikvøllin í Rom. 2-1 sigurin í Parkini var í øllum førum nakað, sum fótbóltsáhugað runt í Europa løgdu merki til, og hóast Lazio má metast at hava fyrimun av útivallarmálinum í Parkini, so skulu teir framvegis vinna fyri at koma víðari.

## Tørvur á skjótum monnum

Hetta ger eisini, at tað tykist vera sannlíkt, at rúmd verður Toda Jónsson við síðuna av Sibusiso Zuma í FCK álopinum. Eisini hóast føroyski landsliðsleikarin bert hevur spælt ein lítlan hálvleik av superligabólti hetta kappingarárið.

Tað er nevnliga lítið at ivast í, at tað verður Lazio, sum fer at trýsta týskvøldið, meðan FCK so má dúva upp á snarálopini, og júst til tað spælið munnu tað vera fáir spælarar í Danmark, sum eru betri enn Todi Jónsson.

Skjóti rykk hansara við bóltinum kunnu væl hugsast at vera lykilin, sum skal lata italsku verjuna upp,. Aftasti maður hja italienarunum, tann í Føroyum so væl kendi Sinisa Mihajlovic, er so avgjørt ikki vorðin skjótari við árunum, og megnar hann neyvan at kapprenna við Toda, um møguleikin kemur.

Á heimavølli, tá Todi var skaddur, var tað Heine Fernandez, sum var á álopinum saman við Zuma, og gjørdist hann eisini matcvinnari, tá hann høgdi ein leysan bólt í málið úr stuttari fjarstøðu. Júst hetta við at lúra inni í brotsteiginum er avgjørda styrkin hjá Heine, men tað verður neyvan við slíkum spæli, at FCK skal skora hesaferð, og tí tykist tað sannlíkt, at Todi verður við frá fyrsta bríksli.

## Eru væl fyri

Hóast FCK ikki hevur havt nøkur serlig úrslit síðani sigurin á Lazio, so er lítið at ivast í, at góðskan á spælinum verður lyft fleiri stig týskvøldið.

Sálarliga hevur tað við vissu órógvað leikararnar, at hesin týdningarmikli dysturin stendur fyri framman, og at leikararnir eru til reiðar at tørna út, er lítið at ivast í.

Eftir at Todi er vorðin til reiðar at spæla, eru tað nú bert Christan Lønstrup og Pascal Simposon, sum eru á skaðalistanum, og hóast serliga Lønstrup hevur ein týðandi leiklut á liðnum, so er hópurin somikið breiður, at hann kann bera hesa fráveruna.

Eisini Lazio tykjast tó at vera væl fyri, og undir øllum umstøðum mugu teir roknast sum favorittar at koma víðari. Enn er italska kappingin ikki byrjað, men venjingarstøðan hjá italiumonnunum er tvær vikur betri nú, enn hon var í Parkini, so einki er at ivast í, at trýstið á FCK verjuna verður stórt.

Stórsta trýstið er tó á spælarunum hjá Lazio. FCK kann væl liva við at fara út úr kapipngini, og ístaðin taka lut í ikki heilt so fínu UEFA-kappingini.

Tað kann Lazio ikki. Felagið hoyrir sum sagt heima millum tey stóru í Europa, og eitt farvæl til meistarakappingina merkir helst ein peningamiss upp á hundraðtals milliónir, og ikki minst fer tað at geva teimum eitt stórt minus í europeisku karakterbókini.

Danska sjónvarpsrásin, TVDanmark, sendir dystin beinleiðis, so føroyingar, sum hava atgongd til eina parabol við digitalum dekodara, kunnu fylgja við, tá FCK og vónandi Todi Jónsson skulu royna seg í Italia.